KFUM skótarnir á Glyvrum 20 ár:

# Skótarørslan stóran týdning

**10. juni vóru 20 ár liðin síðani KFUM skótarnir á Glyvrum vóru settir á stovn. Hetta varð hátíðarhildið í Missiónshúsinum á Glyvrum týskvøldið við framsýning, talum og drekkamunni**



*Heilt fitt av fólki var møtt upp í Missiónshúsinum á Glyvrum. Stólarøðini vóru mestsum øll full*

SKÓTAR
*Ingrid Bjarnastein*

**Glyvrar:** Sjálvt um regnið dýkir á uttanfyri, so hava heilt fitt av fólki leitað sær í Missiónshúsið á Glyvrum. Týskvøld er, men fyri skótarnar er hetta ikki eitt heilt vanligt týskvøld. Tí 10. juni vóru liðin 20 ár síðani KFUM-skótarnir á Glyvrum vóru settir á stovn.

20 ára haldið varð hátíðarhildið av úlvum, skótum, gomlum skótum, foreldrum, bólkaráðlimum, leiðarum og øðrum sum á ein ella annan hátt hava ella hava havt tilknýti til skótarnar á Glyvrum.

## 80 er miðaltalið

Til hátíðarhaldið týskvøldið helt Lasse Klein, fyrrverandi bólkaráðsleiðari, eina røðu um søguna hjá KFUM skótunum á Glyvrum.

– Tað var í 1983, at Flóvin Jacobsen, Jóhan Hans Hansen og Hilmar Jan Hansen bóðu meg koma at hjálpa teimum við skótaarbeiðinum á Glyvrum, og eg tók sjálvandi beinanvegin av, tí sjálvur havi eg verið limur í KFUM skótunum síðani 1956, greiddi Lasse Klein frá í røðuni.

KFUM-skótarnir á Glyvrum hava øll árini húsast í missiónshúsinum – í kjallaranum har.

– Tá vit byrjaðu í 1983 høvdu vit 120 limir, og hetta talið hevur svingað upp og niður, men miðaltalið hevur ligið um einar 80 limir um árið. Hetta vil siga, at tilsamans hava 1600 børn og ung verið limir hjá KFUM-skótunum á Glyvrum.

Skótarnir á Glyvrum hava limir úr øllum bygdum á eystara armi á Skálafjørðinum, og metir Lasse Klein, at áhugin fyri skótalívinum hevur verið ovurhondsstórur.

– Skótaarbeiðið krevur nógv av teimum, sum dagliga fáast við tað, og skótarørslan hevur eisini merkt bæði upp- og niðurgangs tíðir. Men bólkaráð, sum eru foreldur, hevur havt stóran týdning, og ikki at gloyma teir ótroyttiligu leiðararnir, segði Lasse Klein.

## Mennandi

Lasse Klein dylir ikki, at skótarørslan hevur stóran týdning.

– Endamálið hjá okkum er at fáa ung at møta gleðiboðskapinum. Uppala tey til góðar samfelagsborgarar og geva teimum eina felagsábyrgd og virðing fyri medmenniskjunum.

Hesi seinastu árini hava 30 ymisk fólk mannað bólkaráðið hjá KFUM-skótunum á Glyvrum, og 60 leiðarar hava tikið sær av úlvum og skótum seinastu árini.

– Skótalívið er eitt spennandi og mennandi frítíðarítriv. Ungdómurin umboðar ein týdningarmiklan part av okkara samfelag í dag. Tey eru tann mest kensluríki og livandi parturin. Og havi eg nakað ynski, so er tað, at vit eiga at standa saman sum ein felagsskapur, har vit fáa møguleika at knýta bond. Við stremban fáa vit eitt gott oglæruríkt samfelagslív, tjóð okkara at frama, segði Lassen Klein at enda.

Heilt fitt av fólki var komið saman til at hátíðarhalda dagin saman við skótum, úlvum og leiðarum, og stólarøðirnar í Missiónshúsinum vóru so at siga allar fullar.

Aftaná røðuna hjá Lassa Klein vórðu ljósmyndir frá eini skótalegu í Noregi vístar. Felagssangur var eisini á skránni, sum Eivind Simonsen, skipaði fyri.

Framsýningin sum varð sett upp á ovaru hæddini á Missiónshúsinum hevði myndir frá teimum mongu árunum skótarnir hava verið á Glyvrum og ymiskt annað frá fyrstu tíðini hjá skótaliðnum.

Aftaná var drekkamunnur til gestirnar í kjallaranum, og umframt kaffi og annað gott, so vóru tvær avbera vakrar køkur. Tær vóru skrýddar við litaðum marsipani, sum vísti merkið hjá KFUM-skótunum. Heilt avgjørt ein hugnalig løta fyri úlvar, skótar og øll hini.




*Ein avbera vøkur køka skrýdd við marsipani var til gestirnar á 20 ára stovningardegnum hjá KFUM-skótunum á Glyvrum*





**UTTAN ÚR HEIMI**

# Ísraelskt rakettálop hóttir friðarætlanina



*Hamas-leiðarin Abdul Aziz al-Rantissi á sjúkrahúsi í Gaza býi, eftir at hann varð saærdur í ísraelska rakettálopinum. Nú lovar Hamas at hevna álopið, sum kostaði trimum sivilfólkum lívi*

**Ísraelsku rakettirnar, sum særdu ein av leiðarunum í Hamas og drupu trý onnur, kunnu gera enda á teirri seinastu royndini at fáa frið millum ísraelsmenn og palestinar.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Tá Ísrael herfyri tók undir við teirri seinastu friðarætlanini, játtaði landið eisini at steðga álopunum á palestinsk sivilfólk, men tann tilsøgnin varð brotin, tá tríggir palestinar doyðu í einum ísraelskum rakettálopi týsdagin.

Álopið var vent ímóti einum av leiðarunum í tí víðgongda felagsskapinum Hamas, men Abdul Aziz al-Rantissi slapp frá álopinum á lívi. Hinvegin kostaði álopið einari kvinnu, einari fimm ára gamlari smágentu og einum lívverja hjá Hamas-leiðaranum lívið

Í gjár vóru stórar mótmælisgongur í Gaza. Tað var Hamas, sum skipaði fyri, og felagsskapurin hevur eisini gjørt greitt, at hann fer at hevna ísraelska rakettálopið.

George W. Bush, forseti, var í síðstu viku í Miðeystri, og hann hevur lagt stóran dent á at seta ferð á friðartilgongdina, og tí er tað ikki so løgið, at forsetin harmast ísraelska álopið.

- Tað harmar meg, at Ísrael nýtir stríðstyrlur í álopum á palestinsk sivilfólk, og eg haldi ikki, at ein álop sum hetta er til gagns fyri ísraelsku trygdina, segði Bush fyrrakvøldið. Hann legði afturat, at ísraelska rakettálopið fer ikki at gera tað lættari hjá palestinsku leiðsluni at sannføra teir víðgongdu felagsskapirnar um, at teir eiga at binda frið nú.

Í Ísrael verjir Ariel Sharon, forsætisráðharri, álopið. Hann sigur, at Ísrael noyðist at stríðast ímóti yvirgangsmonnum, so leingi eingin annar ger tað.

Eygleiðarar í Miðeystri siga, at ísraelska rakettálopið var ikki bert eitt álop á palestinar, men eisini eitt álop á friðarætlanina og á Miðeystur-politkkin hjá amerikanska forsetanum.

### Fakta

Hamas-felagsskapurin er tann næststørsti palestinski felagsskapurin. Bara Fatah-rørslan hjá Yasser Arafat er størri.

Hamss er í dag tann størsti av teimum hernaðarligu palestinsku felagsskapunum.

**Leiðari:** Sheikh Ahmed Yassin.
**Limir:** Fleiri túsund umframt fleiri túsund viðhaldsfólk.
**Støða:** Felagsskapurin hevur slitiðsamráðingarnar við Mahmoud Abbas, forsætisráðharra um eina vápnahvíld.

# Byggja rættarhøli í Guantanamo

**Á amerikansku herstøðini á Kuba eru tey farin undir at byggja eitt høli til rættarmálini ímóti fólki, sum eru undir illgruna fyri at hava samband við al-Qaeda.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Amerikanarar eru nú farnir undir at byggja eitt rættarhøli á herstøðini Guantanamo á Kuba, har teir hava einar 680 fangar, sum eru undir illgruna fyri at hava havt samband við yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda. Teir flestu vórðu tiknir í Afghanistan og fluttir til Kuba.

Amerikanskir embætismenn hava eisini umrøtt spurningin at byggja eitt avrættingarhøli á herstøðini, men John Smith, sum er løgfrøðingur hjá amerikanska hervaldinum, sigur, at enn er ov tíðliga at siga nakað um møguligar avrættingar.

- Vit hava ikki gjørt av, hvar fangar møguliga skulu avrættast, sigur John Smith.

Fyri einum mánað síðani tilnevndi verjumálaráðið Pentagon ein høvuðsákæra og ein verja, og hetta varð tulkað sum eitt tekin um, at amerikanararnir ætla at lata fangarnar í Guantanamo koma fyri ein hernaðardómstól.

- Verður talan um hernaðarlig rættarmál, vænta vit, at sjálv revsingin eisini verður fullførd í Guantanamo, sigur John Smith.

Enn er eingin av teimum 680 fangunum skuldsettur.

## Metstórt hall

Hallið á amerikansku fíggjarlógini kom upp í 291 milliardir dollarar í síðsta mánað, og mett verður, at tað kemur upp á einar 400 milliardir dollarar, áðrenn hetta fíggjarárið endar.

Hallið í mai var ein triðing størri enn hallið í apríl, og tað er samstundis nýtt met. Gamla metið var frá 1992, tá tað var var 290 milliardir dollarar.

Til samanberingar kann nevnast, at í 2000 hevði USA 236 milliardir dollarar í avlopi á fíggjarlógini. Men teir pengarnar og meiri afturat hevur sitandi stjórnin nýtt til skattalættar, størri hernaðar- og trygdarútreiðslur og kríggið í Irak, samstundis sum skattainntøkan er minkað.

## Sum heitt breyð

Tað er fáum rithøvundum beskorið at selja 200.000 bøkur eftir einum samdøgri, men tað kann fyrrverandi amerikanska forsetafrúan Hillary Rodham Clinton nú rósa sær av.

Nýggja bók hennara, "Living History", varð seld í meiri enn 200.000 eintøkum tað fyrsta samdøgrið, eftir at hon var komin í bókabúðirnar, og forlagið hevur longu boðað frá, at tað hevur gjørt av at prenta 300.000 eintøk afturat. Í fyrsta umfari er bókin prentað í einari millión eintøkum.

Simon & Schuster, sum forlagið eitur, hevur goldið Hillary Rodham Clinton 50 milliónir krónur fyri útgávurættindini.

## Eiga ikki at koyra um náttina

Norsku vegamyndugleikarnir umhugsa nú at banna óroyndum bilførarum at koyra um náttina, tí hagtøl vísa, at teir eru alt ov ofta uppi í ferðsluóhappum, sum henda í náttarmyrkrinum.

Vegamyndugleikarnir siga, at fólk, sum hava havt koyrikort í minni enn hálvt annað ár, eru í nógv størri vanda fyri at enda í ferðsluóhappum um náttina enn um dagin. Hjá teimum royndu bilførarunum er munurin nógv minni.

- Vit vita, at onnur lond hava roynt hetta við góðum úrsliti. Í fyrsta umfari fara vit at kanna, hvussu royndirnar hava verið aðrastaðni, og tað er ikki óhugsandi, at vit fara at gera tað sama her, sigur ferðslustjórin hjá norsku vegamyndugleikunum, Eva Solvi, við norsku tíðindastovuna NTB.

## Fríkendur men 53 ár ov seint

Ein breti, sum varð dømdur sekur í morði og hongdur fyri 53 árum síðani, er nú vorðin fríkendur.

Tann 27 ára gamli George Kelly varð avrættaður í 1950, eftir at rætturin hevði dømt hann sekan í at hava myrt biografstjóran Leonard Thomas undir einum ráni í Liverpool árið fyri.

Skyldfólk hjá George Kelly hava øll árini hildið uppá, at hann var ósekur, og tey hava víst á, at ákæruvaldið fjaldi sera týdningarmikið próvtilfar, so verjarnir ongantíð sluppu at síggja tað. Millum annað hevði eitt vitni greitt frá, at tað var ikki Geiorge Kelly, men ein annar maður, sum framdi morðið. Málið kom aftur í rættin herfyri, og týsdagin komu tríggir av teimum fremstu dómarunum í Bretlandi til ta niðurstøðu, at grundarlagið undir úrskurðinum ímóti George Kelly í 1953 var ikki nóg haldgott, til hann at kundi dømast fyri morðið.